FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. februar 2026
J. nr.: 26/03466

Svar uppá fyrispurning nr. 52-084/2025 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um at samráðast í krónum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Verður samráðst í krónum undir sáttmálasamráðingunum?

Svar til fyrispurning nr. 1:
Útgangsstøðið hjá landsstýrinum er kent. Í løgmansrøðuni varð sagt, at útgangsstøðið er, at vit í størri mun samráðast um krónur.

Fyri framman eru nú sáttmálasamráðingar, har fakfeløgini hvør sær skulu samráðast við Fíggjarmálaráðið um sín egna sáttmála. Hetta er galdandi fyri øll fakfeløg, eisini tey, sum nú hava gjørt avtalu um felags lønarkarm. Av tí at samráðingarnar við hesi fakfeløgini ikki eru byrjaðar enn, er í løtuni ikki møguligt at siga meira um innihaldið og gongdina í samráðingunum.

Tað tænir ikki endamálinum at umrøða samráðingar alment, meðan sáttmálasamráðingarnar eru. Fíggjarmálaráðið virðir fría samráðingarrættin hjá fakfeløgunum, og samráðingarnar eru í trúnaði, eins og vanligt er, inntil sáttmáli er undirskrivaður.

Landsstýriskvinnan skal tó viðmerkja, at ein misskiljing tykist vera komin í um tann karm, sum nú er avtalaður við 12 fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum. Henda avtalan bindur – sjálvandi - ikki onnur fakfeløg enn tey, sum hava undirritað avtaluna.

Tað vanliga hevur verið, at tað fakfelagið, sum samráðist fyrst, leggur støðið. Munurin hesaferð er, at 12 fakfeløg hava verið við til at leggja støðið. Landsstýrið hevur í avtaluni við tey 12 fakfeløgini bundið seg sjálvt til, at um tað verður ein munur í teimum avtalum, sum verða gjørdar, skal tað verða grundgivið væl, um hví tað verður gjørt, og tað skal verða gjøgnumskygni um bæði orsøk og grundarlag.

Tinganes, 24. februar 2026

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum